tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 06.05.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, ~~Eyð Jóna Eidesgaard~~

Varalimir: Jens Arni Hammerfoss Leo

Ikki møtt: Eyð Jóna Eidesgaard

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 20/24 | 24/00047-2 | Tvøroyrar skúli -Umsókn um játtan til keyp av teldum 2024 |
| 21/24 | 23/00079-1 | Kommunusamanlegging -arbeiðsbólkurin *(Leingjan av avtalu)* |
| 22/24 | 24/00088-5 | Kommunusamanlegging tilmælið um ”Vegleiðandi fólkaatkvøða" nú álitið er handa 18. mars 2024 |
| 23/24 | 24/00120-2 | Mýrifípan -Barnaansingin í summarfrí, *skriv frá leiðsluni á Suðuroyar Sjúkrahús 2024* |
| 24/24 | 24/00103-5 | Mótmæli og broytingaruppskot -til uppskot um broyting av byggisamtykt - víðkan av havnarlagnum -*(Livilig kor 15. apríl 2024).* |
| 25/24 | 24/00093-1 | Uppskot um broyting av byggisamtykt - víðkan av havnarlagnum - *(nýggj framløga 1. mars 2024)* |
| 26/24 | 24/00094-7 | P/F Varðin Pelagic -parts- & grannahoyring, samb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, við atliti til bygging á havnalagnum. |
| 27/24 | 24/00075-2 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2024/25 |
| 28/24 | 21/00588-41 | Nýgerð av spæliplássi í Froðba -*eykajáttan* |
| 29/24 | 23/00096-4 | Sparkivøllurin í Trongisvági - *umvælingar* |
| 30/24 | 23/00352-2 | Thorshavn M/S -umsókn um stuðul 2023 |

| | | |
|---|---|---|
| **Til kunningar** | | |
| 11/24 | 24/00089-2 | RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2024 |
| 12/24 | 24/00131-5 | SEV -aðalfundurin 19. apríl 2024. |
| 13/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Eyð Eidesgaard hevur fráboðað, at henni berst ikki til at møta til býráðsfundin í dag 6. mai 2024, og hevur hon heitt á Jens Arni Hammerfoss Leo, ið er næst (2) valdi varalimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020, at møta ístaðin. Jens Arni Hammerfoss Leo hevur frammanundan havt sæti í býráðnum og tekur sostatt sæti til býráðsfundin 6. mai 2024, uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna – Ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

**<u>20/24</u>**
**<u>24/00047-2 Tvøroyrar skúli -Umsókn um játtan til keyp av teldum 2024</u>**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.02.2024 | 7/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 16/24 |
| 3 Mentanarnevndin | 11.03.2024 | 16/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 17/24 |
| 5 Býráðið | 25.03.2024 | 17/24 |
| 6 Mentanarnevndin | 22.04.2024 | 23/24 |
| 7 Býráðið | 06.05.2024 | 20/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.02.2024**
Tilmælið frá skúla stjóranum, Jón Johannesen um at dagføra Tvøroyrar Skúla við keyp av teldum.

<u>Skúlastjórin upplýsir at:</u>
Ætlan skúlans er at keypa 40, helst 60 nýggjar farteldur, tí so meta vit, at vit nøkta tørvin her og nú. Upplýst verður at skúlin hevur fingið tilboð uppá keyp av 70 stk. Lenovo ThinkPad T480s (Refurbished) A-Gradei5-8250U 1,60GHz - 8RAM - 256SSD - W11P14" FHD fyri kr.                - ex. MVG.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ 2024, §411 íløgur skúlin er ongin játtan avsett til teldur.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 19. februar 2024:</u>**
Einmælt samtykt at ganga umsókníni hjá skúlastjóranum á møti at keypt verður 60 teldur, samb. viðlagda tilboð. Mælt verður til at fíggja hetta av §411 (húsavørður) -Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 22. februar 2024:</u>**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at umsitingin heitur á skúlaleiðsluna um eisini at innheinta tilboð frá øðrum veitara. Málið verður beint aftur í mentanarnevndina.

**Kommunustjórin 10.03.2024:**
Skúlaleiðslan hevur nú umbiði tvey sambærlig tilboð frá tveimum veitarum, har tað lægra tilboði ljóðar á 70. stk teldur fyri kr. meðan hægra tilboði er 70. stk teldur fyri kr. , báðir prísir eru ex. mvg. Ongin játtan er avsett á FÆ2024 til hesa íløgu. Mælt verður til, at hetta verður fíggja av §411 "íløga skúli", annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**Mentanarnevndin 11. marts 2024:**
Mentanarnevndin mælir einmælt til at taka av lægra tilboðnum. -málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Mælt verður til, at keypið verður fíggja av grein §411.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Borgarstjórin mælir til, at umsitingin heitur á skúlastjóran um tilmælið til hvørjar teldur eru best egnaðar til skúlan, og málið verður lagt fyri komandi býráðsfund. -einmælt samtykt

**Býráðið 25. marts 2024:**
Bjarni Hammer form. í mentanarnevndini mælir til at útseta málið til ein seinni fund. -einmælt samtykt

**Kommunustjórin 11. apríl 2024:**
Skúlastjórin hevur við telduposti dagf. 5. apríl til umsitingina gjørt vart við, at skúlin hevur skund tørv á teldum. Skúlastjórin skrivar m.a. at:

> *Í løtuni hava vit um 50 teldur úti á Tvøroyri, ið virka hampiliga. Av teimum verða um 20 nýttar á serøkinum. T.v.s. 120 næmingar deilast um 30 teldur. Í Trongisvági eru 20 vælvirkandi teldur til gott og væl 80 næmingar. hetta er als ikki nøktandi. Síðst í mai-mánaði hava vit endaligu próvtøkuna hjá 9. og 10.fl., og tá hevði verið gott at havt nýggjar vælvirkandi teldur til næmingarnar. Vit hava søkt um keyp av 70 teldum, hetta kann deilast upp, so vit keypa helvtina nú og helvtina seinni í ár. Sum sagt er hetta ein vinarlig áheitan á TVK, og vónandi skilja tit okkara støðu hesum viðvíkjandi.*

Kommunustjórin hevur tískil hin 6. apríl heitt á borgarstjóran um at viðgerða málið sum skund mál - *samb. løgtingslóg um kommunustýri §21, stk. 3. har ásett er, at borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva-*. Kommunustjórin hevur tessvegna mælt borgarstjóranum til at játta og heimila skúlanum at keypa 35 stk. teldur beinanvegin samb. tilboð, ið er ynskið og tilmælið hjá skúlastjóranum.

Borgarstjórin hevur tikið avgerð 8. apríl, og hevur játtar og heimila skúlanum at bíleggja 35 teldur samb. tilboð, og verður støða tikin til írestandi keyp seinni.

Til støðutakan er játtan og keyp av teldum til skúlan. Mælt verður til, at allar teldur verða fíggjaðar av §411 "íløga skúli", annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**Mentanarnevndin 22. april 2024:**
Nevndin er kunna um avgerðina hjá borgarstjóranum at keypa fyribils 35 teldur.
Nevndin mælir einmælt til at írestandi 35 teldur verða keyptar samb. tilmælið hjá skúlastjóranum.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir til at býráðið samtykkir tilmælið hjá mentanarnevndini at játta skúlanum at keypa 70 stk. teldur, ið verða játtaðar av §411, íløgur til skúlan. -Einmælt samtykt.

**21/24**
**23/00079-1 Kommunusamanlegging -arbeiðsbólkurin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 19/23 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 20/23 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 29/23 |
| 4 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 27/24 |
| 5 Býráðið | 06.05.2024 | 21/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.02.2023**
Arbeiðsbólkurin, ið umboðar tær tríggjar kommunurnar í Suðuroynni Hvalba, Fámjin og Tvøroyri, sum hava samtykt at kanna fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni, hevði fyrsta fundin í býráðssalinum á Tvøroyri 2. mars 2023, og tey 6 valdu umboðini í arbeiðsbólkinum skipaði seg soleiðis:

- Róin Schrøder, form. *–valdur í arbeiðsbólkin av Hvalbiar bygdaráð*
- Doris Bjarkhamar, næstforkv. *–vald í arbeiðsbólkin av Tvøroyrar býráð*
- Ólavur Rasmussen, skrivari. *–valdur í arbeiðsbólkin av Hvalbiar bygdaráð*
- Eyðdis Ellendersen, nevndarlimur. *–vald í arbeiðsbólkin av Fámjins bygdaráð*
- Herit Albinus, nevndarlimur *–vald í arbeiðsbólkin av Tvøroyrar býráð*
- Niels Jákup Trúgvason Nielsen, nevndarlimur. *–valdur í arbeiðsbólkin av Fámjins bygdaráð*

**Tilgongdin til arbeiðsbólkin:**
**Tvøroyrar Kommuna**

Tvøroyrar býráð hevur á fundi 6. september 2022 einmælt samtykt, at heimila Kristin Michelsen, borgarstjóra at taka stig til, at Tvøroyrar býráð heitur á hvørja einstøku kommunu í Suðuroynni um at velja limir í ein arbeiðsbólk, at viðgerða sjálvbodna kommunusamanlegging í Suðuroynni, og at geva borgarstjóranum heimild at hava fund við allar borgarstjórar í Suðuroynni at viðgerða uppskotið at velja limir í arbeiðsbólk, við uppskot til arbeiðssetning:

- *at hesin fremur eina lýsing av hvørjari kommunu sær av fyrimunum og vansum við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni, og at arbeiðsbólkurin orðar eina niðurstøðu, ið verður løgd til støðutakan hjá hvørjari kommunu sær innan 31.12.2023"*

**Fundur á Hamragarði 21. Sep. 2022 har allir borgarstjórar luttóku:**

Tilmælið og samtyktin á fundinum á Hamragarði hin 21. September 2022, kl. 18.30, har allir borgarstjórar og kommunuskrivarar vóru møttir, var:

- Full semja var millum allar borgarstjórar, at hesir hvør í sær leggja uppskotið fyri teirra kommunustýrið, hvørt kommunan ynskir at vera umboðað í arbeiðsbólkinum, ið skal lýsa fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging í Suðuroynna.
- Og um kommunustýrið tekur undir við uppskotinum, velur hvørt kommunustýrið sær eitt umboð í arbeiðsbólkin, sum fær til uppgávu at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging.
- Kristin Michelsen mælti til, at raksturin av arbeiðsbólkinum verður fíggjaður eftir sama býtislyklið, sum er galdandi fyri BHS. Hetta var breið semja um, treyta av at kommunustýrið samtykti uppskotið.

**Eftirfylgjandi viðgerð av uppskotinum í hvørjari kommunu sær:**

**Hvalbiar Kommuna**

Hvalbiar kommuna hevur á bygdaráðsfundi 24.10.2022, einmælt samtykt at velja lim í arbeiðsbólk at kanna fyrimunir og vansar við uppskoti um sjálvbodna kommunusamanlegging.

**Fámjins Kommuna**

Fámjins kommuna hevur einmælt samtykt at velja fólk í samstarvsbólk at arbeiða við sjálvboðnari kommunusamanlegging í Suðuroynni.

**Vágs Kommuna**

Vágs Býráð hevur á fundi 26. september viðgjørt áheitanina frá Tvøroyrar kommunu. Vágs Býráð heldur, at hetta er alt og ógreitt, at taka støðu til. Vágs Býráð ynskir at borgarstjórarnir seta seg saman, at gera ein arbeiðssetning fyri arbeiðsbólkin.

**Sumbiar Kommuna**

Sumbiar kommuna hevði hesa áheitan fyri á fundi tann 02.10.2022. Og var einmælt samtykt, at útseta hettar mál, tí kommunustýrið meinar, at her er nógv sum er sera ógreitt.

**Porkeris Kommuna**

Á bygdarráðsfundi 24 oktober 2022 bleiv kunnað um uppskot um kommunusamanlegging í Suðuroy. Bygdarráðið metti á fundinum at málið ikki var búgvi til støðutakan, grunda á at ov fáir upplýsingar eru hesum viðvíkjandi.

**Hovs Kommuna**

Kommunustjórin hjá Tvøroyrar Kommunu hevur 20.12.2022 tosa við borgarstjóran í Hovi, sum upplýsir at kommunustýrið hevur umrøtt málið beint eftir fundin á Hamragarði, men enn ikki tikið endaliga støðu. Upplýst var, at bygdaráðið møguliga hevur ein fund seint í desember í ár, har málið møguliga verður viðgjørt.

**Tvøroyrar Kommuna**

Tvøroyrar býráð hevur á býráðsfundi 29. des. 2022 aftur málið á skrá, eftir at allar kommunurnar í Suðuroynni hava viðgjørt uppskotið um at velja lim í arbeiðsbólk at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni. Fyri at málið ikki skal steðgað upp, og fyri at koma víðari við ætlanina hjá teimum kommununum sum hava samtykt, at velja limir í arbeiðsbólkin, bleiv einmælt samtykt av Tvøroyrar býráð at:

- *at býráðið á Tvøroyri á fyrst komandi býráðsfundi, velur 2 limir í arbeiðsbólkin at lýsa fyrimunir og vansar við kommunu samanlegging.*
- *at mæla Hvalbiar Kommuna og Fámjins kommuna at velja 2 limir hvør í arbeiðsbólkin, ið fer til verka fyrst í komandi árið 2023.*
- *at heita á Hovs Kommunu, um at taka endaliga støðu við tilmælið um at velja 2 limir í arbeiðsbólkin.*

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018
- Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

**Fíggjarligar avleiðingar:** Kostnaðurin verður áleið 500tkr. Ongin ávís játtan er avsett á FÆ2023, og verður mælt til at veita eykajáttan. Mælt verður til býtislykil eftir fólkatalinum pr. jan. 2023, og at Tvøroyrar Kommuna í fyrsta umfari leggur út fyri arbeiðsbólkin, og at innheintingin verður at fara fram umvegis BSL.

| TVK | HVK | FAK | |
|---:|---:|---:|---|
| 1774 | 666 | 79 | Fólk pr. 1.1.2023 |
| 70,42 | 26,44 | 3,14 | % |
| 352.000,- | 132.000,- | 15.000,- | ~ 500.000,- |

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá at veita samsýning samb. uppskot hjá arbeiðsbólkinum. Málið verður beint í býráði.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og játtanin verður veitt sum eykajáttan av innistandandi.

**Kommunustjórin 19. apríl 2023:**
Onnur viðgerð av eykajáttan.

**Býráðið 27. april 2023:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð at veita eykajáttan av innistandandi .

**Kommunustjórin 16.04.2024:**
Mælt verður til at leingja avtaluna við arbeiðsbólkin til 30. apríl 2024, samsvarandi avtalu við borgarstjórar um at arbeiðsbólkurin skipar fyri framløgum av álitinum fyri býráðslimum og til borgarafundir, samt áheitan/samtykt á arbeiðsbólkin um at fyrireika fólkaatkvøður.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir til at leingja avtaluna við arbeiðsbólkin fram til hálvan juni 2024, tá vegleiðandi fólkatkvøðan um kommunusamanlegging er avgreidd. -Einmælt samtykt.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir til at býráðið samtykkir tilmælið hjá fíggjarnevndin at leingja avtaluna við arbeiðsbólkin fram til hálvan juni 2024, tá vegleiðandi fólkatkvøðan um kommunusamanlegging er avgreidd. -einmælt samtykt.

**22/24**
**24/00088-5 Kommunusamanlegging tilmælið um ”Vegleiðandi fólkaatkvøða"**

**nú álitið er handa 18. mars 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2024 | 15/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 22/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19. Mars 2024**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at viðgerða álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging, har støða verður tikin til tilmælið um at skipa fyri ”Vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging”. Eisini mælir borgarstjórin til, at býráði heitur á arbeiðsbólkin um at arbeiða víðari við málinum, áðrenn býráðið tekur endaliga støðu til kommunusamanlegging á einum seinni býráðsfundi.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023.
- Løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020
- løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.
    - **§ 1.** løgtingslóg ásetir treytirnar fyri sjálvbodnum kommunusamanleggingum og eindum, ið sjálvbodnar samanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur skulu halda seg innanfyri.
    - **§ 2.** Sjálvbodnar kommunusamanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur kunnu verða framdar/framd innan hesar eindir:
        - 7) Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur
    - § 3. Avtalur um kommunusamanlegging skulu hava fyrilit fyri:
        - 1) at stovnseta kommunueindir, sum eru samfeldar landafrøðiliga og samferðsluliga,
        - 2) Møguleikunum fyri at menna fólka-, vinnu- og búskaparviðurskifti,
        - 3) at røkja kommunuuppgávur, og
        - 4) at fólkatalið helst skal vera í minsta lagi 2000 borgarar.
        - Stk. 2. Reglurnar í stk. 1, nr. 1 og 4 eru ikki galdandi fyri útoyggjakommunur, ið hava ætlanir um kommunusamanlegging sínámillum.
    - § 4. Áðrenn avtalur um kommunusamanleggingar verða góðkendar av landsstýrismanninum sambært § 5, skal semja í minsta lagi vera um:
        - 1) kommununavnið, har heitið "kommuna" skal vera ein partur av navninum,
        - 2) staðseting um, hvar og hvussu kommunustýrið finnur sær sæti,
        - 3) mannagongd um samanlegging av fyrisiting,
        - 4) uppgerð av ognar- og fíggjarviðurskiftum,
        - 5) tíðarfesting um, nær samanleggingin skal vera fullførd, og
        - 6) um staðbundnar nevndir skulu verða settar.

- § 5. Avtalur um sjálvbodnar kommunusamanleggingar skulu góðkennast av landsstýrismanninum.
    - Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann, eftir góðkenning frá viðkomandi kommunum, umskipa og tillaga kommunumark, har kommunusamanleggingin ber við sær óhóskilig marknaviðurskifti. Eru ivamál um kommunumark, tekur landsstýrismaðurin avgerð í málinum.
    - Stk. 3. Avgerðir sambært stk. 1 og 2 eru endaligar innan fyrisitingina.
- § 6. Uttan mun til, um tað snýr seg um kommunusamanlegging, kann landsstýrismaðurin góðkenna eina umskipan av markinum í millum kommunur, um semja er teirra millum.
- § 7. Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging eftir ásetingunum í kommunuvallógini.
    - Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um vegleiðandi fólkaatkvøðu.

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Kristin Michelsen mælir býráðnum til at taka álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging til eftirtektar, og at heita á arbeiðsbólkin um at fyrireika upppskot til fólkaatkvøðu í Tvøroyrar kommunu, ið verður lagt fyri býráðsfundin í apríl. -Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 4. mai 2024**
Arbeiðsbólkurin hevur havt nakrar eftirmetingarfundir við kommunustyrið í Hvalba og á Tvøroyri í apríl og mai mðn., og hevur nú orðað eitt semjuskjal, ið er handa hvørjari kommunu sær hin 4. mai til støðutakan.

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um í fylgiskrivi til semjuskjalið, at á felagsfundi í Hvalba á flaggdegnum, har flestu kommunustýrislimir vóru møttir, varð samtykt at seta ein fylgibólk við kommunustýrislimum, sum saman við arbeiðsbólkinum skuldi orða eitt semjuskjal, við m.a. støði í lóg um sjálbodna kommunusamanlegging. Á fundinum í Hvalba á flaggdegnum bleiv samtykt, at borgarstjóranir skuldi verða í fylgibólkinum samt 2-3 kommunustýrislimir í hvørjari kommunu sær. Tvøroyrar kommuna varð umboða av borgarstjóranum og Jónleyg J. Bech, ið hava haft innanhýsis fundir við arbeiðbólkin.

Borgarstjórin upplýsir at arbeiðsbólkurin, og umboðini fyri Tvøroyrar- og Hvalbiar kommunu í fylgibólkinum taka undir við semjuskjalinum, og mæla umboðini fyri Tvøroyrar kommunu býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi semjuskjali.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir til, at býráðið samtykkir semjuskjalið sum fyriliggjandi, og at miða verður eftir at hava vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging á Tvøroyri og Hvalba samstundis um hálvan juni 2024. -Einmælt samtykt

## 23/24
## 24/00120-2 Mýrifípan -Barnaansingin í summarfrí, skriv frá leiðsluni á Suðuroyar Sjúkrahús 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 22.04.2024 | 10/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 23/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19. Apríl 2024**
Forkv. í Sosialu nevnd ynskir viðgerð av áheitan hjá stjóranum á Suðuroyar Sjúkrahús, um at endurskoða ætlanina um at lata barnaansingina aftur.

Stjórin á Suðuroyar Sjúkrahúsið skrivar 18. Apríl til forkv. í SN og til umsitingina.

*Suðuroyar Sjúkrahús hevur frætt, at flestu kommunurnar í oynni stongja barnaansingarøkið í eitt tíðarskeið í summar. Hetta kemur sera dátt við hjá sjúkrahúsinum, sum orsakað av hesum hevur sera trupult við at fáa starvsfólk/foreldur til arbeiðis hetta tíðarskeiðið.*

*Suðuroyar Sjúkrahús er eitt akuttsjúkrahús við funktiónum bæði innan medisin og kirurgi. Sjúkrahúsið er opið alt samdøgrið og allar dagar í árinum. Vit hava tørv á nógvum starvsfólkum, sum arbeiða ólagaligar arbeiðstíðir og eisini, tá onnur fólk hava feriu. Tá talan er um eina so týðandi funktión sum eitt akutsjúkrahús, so er ikki møguligt at tillaga virksemið eftir árstíð, feriu ella halgidøgum, men neyðugt er altíð at hava somu akuttu tilbúgving og tænastu.*

*Tá flestu kommunur í Suðuroynni velja at lata barnaansingarøkið aftur í eitt tíðarskeið í summar, er tað sera trupult hjá sjúkrahúsinum at fáa mannað vaktir hetta tíðarskeiðið, barnaansingarøkið er stongt. Hetta tí, at nógv av starvsfólkunum eru foreldur at børnum, sum nýta gott av hesum vælferðartænastum, og verða foreldrini nú noydd at halda feriu samstundis, sum barnaansingin er stongd.*

*Barnaansingin er ein týðandi liður í, at foreldur og starvsfólk sleppa til arbeiðis, og er harvið við til at tryggja, at ein vælfarðartænasta sum sjúkrahúsið kann fungera.*

*Vit vilja við hesum skrivið vísa á trupulleikan á økinum nú barnaansingin stongir í summarferiuni, og vóna at málið kann takast upp til nýggja viðgerð.*

*Hetta brævið er sent øllum kommununum í Suðuroynni.*
*Við vón um vælvild.*

*Vinaliga, Hanus Tofttheygg, sjúkrahússtjóri*

***Tilmælið:*** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan

**Sosiala nevnd 22. april 2024:**
Mælt verður til at halda fast við býráðssamtyktina frá 11. mars 2024. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir til, at býráðið samtykkir tilmælið hjá sosialu nevnd, og at málið verður tikið upptil nýggja viðgerð í sosialu nevnd til komandi summar.-
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech
Ímóti: Bjarni Hammer, Kristina Roest, Jens Arni Hammerfoss Leo
Tilmælið hjá sosialunevnd er harvið samtykt

**24/24**
**24/00103-5 Mótmæli og broytingaruppskot -til uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum -(Livilig kor 15. apríl 2024).**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 24.04.2024 | 23/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 24/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.04.2024**
Umsitingin hevur hin 15. apríl 2024 móttikið skriv frá bólkinum Livilig kor á Tvøroyri, ið skriva at: *Til broyting av almennu byggisamtyktini, sum Tvøroyrar Býráð tann 27. apríl 2023 hevur samtykt í § 29: Øki D: Havnarøki, stk. 4 verður hervið mótmælt umframt at broytingaruppskot verður latið inn.*

**Viðlagt eru í alt 4 skjøl:**

- *Mótmæli og broytingaruppskot*
- *Fylgiskjal 1 - Broytingaruppskot til byggisamtykt 27.04.23*
- *Kortskjal 1 - Serstøk byggisamtykt A1 fyri havnarøki á Tvøroyri*
- *Kortskjal 2 - Serstøk byggisamtykt A2 fyri vinnuøki og havnarøki í Líðini*

**Livilig kor skriva víðari at:** *Mótmæli og broytingaruppskot til samtykt Tvøroyrar Býráðs hin 27. apríl 2023 við kunngerð 1. mars 2024 um broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu. Broytingin í almennu byggisamtyktini er partur av broytingum samtyktar 20. februar 2023 til ætlaða víðkan av havnalagnum 100m eystur úr verandi øki hjá Varðanum Pelagic.*

**Mótmælt og átala verður:**

a. *1) Lýsta broytingin fyri Havnarøki D á Tvøroyri við óhóskandi, skaðiligari og skemmandi høgari bygging beint upp at búseting og kirkju.*
b. *2) Ætlaða staðsetingin av protein- (fiskamjøl-) og lýsiverkmiðju við tilvísing til býarskipanir og byggisamtyktir frá 1984, byggimálsviðgerðir fram til nú framløgdu kunngerð frá Tvøroyrar Býráð og til ES tilráðingar um skilnað millum slíkt dálkandi virksemi og búseting.*
c. *b. Broytingaruppskot til staðseting av virkinum hjá Varðanum Pelagic, íroknað nærliggjandi ídnaðarøki og øki til umskipan / nýinnrætting av havnarlagnum á Tvøroyri*

**Viðmerking hjá umsitingini:**
Mælt verður til, at fyriliggjandi mótmæli frá Livilig kor verður tikin við í málsviðgerðini hjá Tvøroyrar býráð, við niðanfyri nevndum viðmerkingum, vísandi til §6 í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir

> *§ 6. 1) Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum.*
>
> *Stk. 2. 1) Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.*

*Stk. 3. 1) Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.*

**Til støðutakan:**
Til støðutakan hjá Tvøroyrar Býráð, hvørt lýsta kunngerðin 1. mars 2024, um broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið "D", og sum var samtykt av Tvøroyrar býráð 27. apríl 2023 stendur við, ella um hesin skal broytast samb. fyriliggjandi mótmælið og broytingaruppskotið

***Býráðið 27. april 2023:***
*Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælið frá Vinnu- og Havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini um at halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum, tó so, at mælt verður til at tillaga orðingin í D: Havnarøki stk. 4 til: «Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.» -Einmælt samtykt*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu & havnanevndini og býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 17. april 2024:**

Nevndin er kunnað um mótmælið og broytingaruppskotið hjá bólkinum “Livilig kor á Tvøroyri”. Innihaldið er tað sama sum nevndin hevur tikið støðu til fleiri ferðir, og nevndin hevur ikki broytt støðu.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. april 2024:**

Nevndin er kunnað um mótmælið og broytingaruppskotið hjá bólkinum “Livilig kor á Tvøroyri”. Innihaldið er tað sama sum nevndin hevur tikið støðu til fleiri ferðir, og nevndin hevur ikki broytt støðu

**Vinnu- og havnanevndin 24. april 2024:**
Nevndin er kunnað um mótmælið og broytingaruppskotið hjá bólkinum “Livilig kor á Tvøroyri”, dagf. 15. apríl 2024.
Innihaldið er grundleggjandi tað sama sum nevndin hevur tikið støðu til fleiri ferðir, og nevndin hevur ikki broytt støðu til málið.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til, eins og Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini hava samtykt, ikki at broytt støðu, men halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023, um broyting av byggisamtyktunum og víðkan av havnarlagnum á Tvøroyri, við byggisamtyktartekstinum, ið bleiv samtyktur 27. apríl 2023 og lýstur av nýggjum við kunngerð 1. mars 2024. **-Einmælt samtykt.**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við uppskotinum til svarskriv til bólkin Livilig Kor, ið umsitingin orðar við løgfrøðiligari ráðgeving, samsvarandi samtyktini í Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini, við niðurstøðuni um, at býráði tekur ikki undir við mótmælinum frá Livilig kor dagf. 15. apríl 2024, eins og býráðið ikki tekur undir við broytingaruppskotunum frá Livilig kor dagf. 15. apríl 2024. - **Einmælt samtykt.**

## 25/24
## 24/00093-1 Uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum - (nýggj framløga 1. mars 2024)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 24.04.2024 | 24/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 25/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 1. mars 2024.**
Eftir at Tvøroyrar kommuna hin 1. mars 2024 hevur móttikið skriv frá Umhvørvismálaráðnum um lutvísa ógilding av broytingini í byggisamtyktini fyri havnarlagið á Tvøroyri, *ið annars varð samtykt av Tvøroyrar býráð hin 27. apríl 2023*, og góðkend av Umhvørvismálaráðnum hin 10 juli 2023, er nú nýggj kunngerð lýst hin 1. mars 2024 við niðanfyri byggisamtyktartekstinum:

**Byggisamtyktarteksturin samtyktur av býráðnum 27. apríl 2023:**

> *Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.*

Lutvísa ógildingin 1 mars hjá Umhvørvismálaráðnum av broytingini í byggisamtyktini fyri havnarlagið á Tvøroyri, er grunda á avgerð hjá Løgtingssinsumboðsmaðurin "LUM", ið hevði viðgjørt klagu av Umhvørvismálaráðnum.

LUM hevur viðgjørt eina klagu av málsviðgerðini hjá Umhvørvismálaráðnum av hesum málinum. Og niðurstøðan hjá LUM er, at tá byggisamtyktarteksturin, ið bleiv samtyktir av Tvøroyrar býráð 27. apríl. 2023, og varð sendir til Umhvørvismálaráðið til góðkenningar, ikki er neyvt tann sami byggisamtyktarteksturin, sum Tvøroyrar býráð samtykti 20. feb. 2023, og sum lág alment frammi til eftirlit í 6 vikur frá 23. feb. 2023, skuldi Umhvørvismálaráðið kravt nýggja framløgu samb. løgtingslóg um býarskipanir §6, stk. 3. *"Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1."*

**Byggisamtyktarteksturin 23. feb. 2023:**
- *Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skortsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins*

**Orsøkin til at broytta byggisamtyktartekstin.**
Tá Tvøroyrar býráð hin 27. apríl 2023 viðgjørdi innkomin mótmælir, valdi býráðið at skerpa orðingina í byggisamtyktartekstunum, til ikki at loyva bygging av goymslubrunnum hægri enn 20 metrum, og ikki loyva skorsteinar hægri enn 60 metrar. Hetta við atlitið til innkomin hoyringarsvar, fyri at forða fyri, at tað í "prinsippinum" evt. kundi loyvast bygging uttan nakað hæddar mark.

Tá býarskipanarnevndin og Umhvørvismálaráðið viðgerða umsóknina hjá Tvøroyrar, varð mett, at henda skerpingin av byggisamtyktartekstunum *[27. Apríl]* ikki broytti bulin í ætlanini at broyta byggisamtyktina fyri havnalagið á Tvøroyri, men her var talan um skerjing og tálmandi áseting av uppruna byggisamtyktartekstunum.

Umhvørvismálaráðið grundgevur eisini fyri LUM hetta sama, at avgerðin at góðkenna broytingina av byggisamtyktini fyri havnalagið á Tvøroyri hin 10. Juni 2023:

> *Umhvørvismálaráðið metir ikki, at endaliga orðingin gevur loyvi til nakað, sum upprunaliga orðingin í uppskotinum ikki gevur loyvi til. Umhvørvismálaráðið metir soleiðis, at tað er identitetur millum upprunaliga uppskotið, sum var lagt fram til alment eftirlit og broytta uppskotið, sum Umhvørvismálaráðið góðkendi.*
> *Umhvørvismálaráðið metir ikki, at broytta orðingin er meira tyngjandi fyri borgaran ella gevur kommunustýrinum víðari heimildir, enn upprunaliga orðingin gjørdi.*
>
> *Tvørturímóti metir Umhvørvismálaráðið, at broytta orðingin er meira avmarkandi enn upprunaliga orðingin, við tað at mark verður sett fyri, hvussu høgir bygningslutirnir, sum býráðið kann geva undantaksloyvi til, kunnu verða. Eisini er ásetingin um almenna hoyring í sambandi við undantøk, ein herðing í mun til upprunaliga uppskotið.*
>
> *Við tað at linara orðingin (sum gevur kommunustýrinum óavmarkada heimild til at geva hæddarfrávik), hevur ligið frammi til alment eftirlit, metir Umhvørvismálaráðið ikki grundarlag vera fyri at krevja, at herda orðingin (sum avmarkar heimildina hjá kommunustýrinum til at geva hæddarfrávik og ásetir krav um almenna hoyring, men sum annars endurtekur meginregluna um hæddar hámark), skal leggjast fram til alment eftirlit av nýggjum.*
>
> *Tá hetta er sagt, so metir Umhvørvismálaráðið, at viðgerðin av málinum viðvíkjandi góðkenning av broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyri, sum henda klagan snýr seg um, hevur verið forsvarlig, at málið er nøktandi upplýst og at avgerðin um at góðkenna broyttu byggisamtyktina er røtt og hvílir á nøktandi grundarlag.*
>
> *Umhvørvismálaráðið metir ikki at fyrisitingarligir feilir eru gjørdir í sambandi við málsviðgerðina, og tey lýti, sum Umhvørvismálaráðið ásannar kunnu sigast at vera við handfaringini av málinum, hava ikki skapt iva um rættarstøðuna og hava ongan týdning fyri rættargildið hjá byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu.*

**Grundgevingin um partvís at ógilda broytingina í byggisamtyktina.**
Avgerðin hjá Umhvørvismáláráðnum -*um partvís at ógilda broytingina í byggisamtyktini fyri havnarlagið á Tvøroyri*- er sum sagt grunda á avgerð hjá Løgtingssinsumboðsmanni "LUM", sum hevur viðgjørt klagu av Umhvørvismáláráðnum um handfaringina av málinum at loyva broyting av byggisamtyktini fyri havnalagið á Tvøroyri.

Umhvørvismálaráði hevur annars grundgivið yvirfyri LUM, at upprunaliga avgerðin hjá Umhvørvismáláráðnum at góðkenna broytingina av byggisamtyktini fyri havnalagið á Tvøroyri hin 10. Juli 2023 var:

- *at Umhvørvismálaráðið ikki hevði mett hesa broytingina í § 29, nr. 4, at hava broytt identitetin hjá uppskotinum til byggisamtyktartekst, sum Tvøroyrar kommuna hevði lagt fram til alment eftirlit sambært § 6, stk. 1, í býarskipanarlógini,*

- *at Umhvørvismálaráði tí hevði mett uppskotið til byggisamtyktartekst, sum varð sent Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar, at vera sama uppskot sum uppskotið, sum Tvøroyrar kommuna hevði lagt fram til alment eftirlit sambært § 6, stk. 1, í býarskipanarlógini,*

- *at Umhvørvismálaráðið tí hevði mett lógarkravið um at leggja fram til alment eftirlit sambært § 6, stk. 1, í býarskipanarlógini at hava verið loki, og*

- *at Umhvørvismálaráðið samanumtikið hevði mett treytirnar fyri at góðkenna uppskotið til byggisamtykt at hava verið loknar og tí hevði góðkent uppskotið*

LUM hevur ikki givið Umhvørvismálaráðnum viðhald í omanfyri nevndum grundgevingum, og hevur ístaðin heitt á Umhvørvismálaráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð, og hevur Umhvørvismálaráðið tí lutvís ógilda broytingina av byggisamtyktini fyri havnarlagið á Tvøroyri.

Byggisamtyktartekstur, *ið bleiv samtyktur av Tvøroyri býráðið 27. apríl 2023*, bleiv sendur til Umhvørvismálaráðið til góðkenningar, saman við avriti av almennu kunngerðini at broyta byggisamtyktina fyri havnalagið á Tvøroyri, har í eisini tvey innkomin mótmælir til ætlanina at broyta byggisamtyktina. Hin 10. juli 2023 sendir Umhvørvismálaráðið til Tvøroyrar kommunu uttan viðmerkingar.

———

**Viðmerking kommunustjórin 21. apríl 2024:**
Tvøroyrar kommuna hevur hin 1, mars 2024 tikið áheitanina frá Umhvørvismálaráðnum til eftirtektar og kunngjørt niðanfyri broyting av byggisamtykt:

> *Vísandi til grein 6 í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar Kommunu verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni á Tvøroyri, Tvørávegur 37.*
>
> *Talan er um, at Tvøroyrar Býráð tann 27. apríl 2023 hevur samtykt fylgjandi broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tvøroyrar Kommunu:*
>
> *§ 29: Øki D: Havnarøki, stk. 4, verður orðað soleiðis:*
>
> *«Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.»*
>
> *Talan er um lýsing av broyting frá 27. apríl 2023, sum er partur av broytingum samtyktar 20. februar 2023.*
>
> *Almenna framløgan er á býráðsskrivstovuni á Tvøroyri, Tvørávegi 37, frá 4. mars 2024 til 25. mars 2024, báðar dagar íroknaðir, í tíðini kl. 09.00 til kl. 15.00 allar dagar, uttan leygar- og sunnudag.*
>
> *Møgulig mótmæli móti uppskotinum og møgulig broytingaruppskot mugu verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2024. kl. 15.00, og skulu sendast til:*
>
> *Tvøroyrar Kommuna*
> *Tekniska deild*
> *Postboks 80*
> *Tvørávegur 37*
> *800 Tvøroyri*
>
> *-ella umvegis teldupost til: tvoroyri@tvoroyri.fo*

---

**Niðurstøða:**
Tvøroyrar kommuna hevur sostatt tikið stig til nýtt uppskot til byggisamtykt sambært vanligari mannagongd og ásetingunum í býarskipanarlógini og kunngjørt av nýggjum byggisamtyktartekstin samtyktur av býráðnum 27. apríl 2023:

*"Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar".*

Tvøroyrar kommuna hevur sostatt við kunngerð hin 1. mars 2024 lagt fram í 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði broyting av byggisamtyktini fyri havnalagið á Tvøroyri. Eins og kommunan hevur á vanligan hátt kunngjørt, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, við lýsing av hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Kunngjørt er, at mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum.

Upplýsast skal í hesum sambandi, at Tvøroyrar kommuna hevur hin 15. apríl 2024 móttikið eitt mótmælisskriv við broytingaruppskotið frá bólkið, sum nevnir seg Livilig kor á Tvøroyri, ið skriva at:

> *Mótmæli og broytingaruppskot til samtykt Tvøroyrar Býráðs hin 27. apríl 2023 við kunngerð 1. mars 2024 um broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu. Broytingin í almennu byggisamtyktini er partur av broytingum samtyktar 20. februar 2023 til ætlaða víðkan av havnalagnum 100m eystur úr verandi øki hjá Varðanum Pelagic.*

a. ***Mótmælt og átalað verður:***

*1) Lýsta broytingin fyri Havnarøki D á Tvøroyri við óhóskandi, skaðiligari og skemmandi høgari bygging beint upp at búseting og kirkju.*

*2) Ætlaða staðsetingin av protein- (fiskamjøl-) og lýsiverkmiðju við tilvísing til býarskipanir og byggisamtyktir frá 1984, byggimálsviðgerðir fram til nú framløgdu kunngerð frá Tvøroyrar Býráð og til ES tilráðingar um skilnað millum slíkt dálkandi virksemi og búseting.*

b. **Broytingaruppskot**

*Broytingaruppskot til staðseting av virkinum hjá Varðanum Pelagic, íroknað nærliggjandi ídnaðarøki og øki til umskipan / nýinnrætting av havnarlagnum á Tvøroyri.*

**Mótmælisskriv við broytingaruppskotið verður viðgjørt sum sjálvstøðugt mál 24/00103.**

**Tilmælið kommunustjórin 21. apríl 2024:**

*1)* Mælt verður til, at Tvøroyrar býráð viðgerð og tekur støðu til innkomin mótmælir og broytingaruppskot hvør sær í serstakari málsviðgerð. *"mál 24/00103"*. Hetta samb. Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir §6., stk. 2. *innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.*

*2)* Tvøroyrar býráð verður at taka støðu til, hvørt ætlaða broytingin av byggisamtyktini fyri havnaøkið "D" skal fremjast og sendast landstýrismanninum til góðkenningar, sum henda er samtykt av býráðnum 27. apríl 2023 og eftirfylgjandi hevur ligið alment frammi til eftirlit frá 1. mars 2024:

*a) "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar."*

**Vinnu- og havnanevndin 24. april 2024:**

Nevndin mælir til at fremja ætlaða broytingina av byggisamtyktini fyri havnaøkið "D", sum samtykt av býráðnum 27. apríl 2023 og eftirfylgjandi hevur ligið alment frammi til eftirlit frá 1. mars 2024:

*b) "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar."*

**Býráðið 06. maj 2024:**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini um at halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktunum og víðkan av havnarlagnum á Tvøroyri, við byggisamtyktartekstinum, ið bleiv samtyktur 27. apríl 2023 og lýstur av nýggjum við kunngerð 1. mars 2024.

*«Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.»*

**Tilmælið hjá borgarstjóranum er einmælt samtykt.**

**26/24**
**24/00094-7 P/F Varðin Pelagic -parts- & grannahoyring, samb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, við atliti til bygging á havnalagnum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 06.05.2024 | 26/24 |
| 2 Tekniska nevnd | | |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.04.2024**
Tvøroyrar kommuna sendi hin 26. mars íalt 54. parts- og grannahoyringarskriv til borgarar, ið mett verður hava tørv á at verða parts -og grannahoyrnir, í samb. við byggimálsviðgerðina av ætlaðu bygging hjá P/F Varðin Pelagic av protein- og lýsuverksmiðju á havnalagnum á Tvøroyri. Við hoyringarskrivinum var frágreiðing til ætlaðu bygging, samt viðkomandi tekningar til verkætlanina.

**Hoyringarskrivið hjá Tvøroyrar kommunu varð orðað:**

*Við hesum verður kunnað um, at P/F Varðin Pelagic hevur hin 29. desember 2022 søkt um byggiloyvi til protein- og lýsuverksmiðju á havnarlagnum á Tvøroyri, ið Tvøroyrar Býráð ætlar at geva byggiloyvi til, treytað av at øll onnur myndugleikaloyvir verða givin til verkætlanina.*

*Hetta hoyringarskrivið snýr seg um ítøkiligu byggiverkætlanina hjá P/F Varðin Pelagic, og verður sent eigarunum av ognum í grannalagnum.*

*Kunnað verður um at Tvøroyrar býráð hevur hin 20. februar 2023 samtykt at broyta byggisamtyktina fyri økið, har ætlanin er at byggja. Í hesum sambandi hevur býráðið ásett, at goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. (P/F Varðin Pelagic søkti upprunaliga um loyvi til at byggja 30 metrar goymslubrunnar).*

*Tvøroyrar býráð hevur hin 25. juli 2023 samtykt, at geva P/F Varðin Pelagic loyvi til at fremja útfylling á uml. 8.000 m2 eystan fyri verandi virkisbygningin hjá felagnum, har goymsluhøll og atløgubryggja skal byggjast, við treyt frá Tvøroyrar kommunu um, at fjøran og atkoman til neystini skal varðveitast. Eisini skal P/F Varðin Pelagic útvega øll myndugleikaloyvir til verkætlanina, har í m.a. loyvi frá Umhvørvisstovuni, ið kann lesast á www.us.fo.*

*Eftirsum at aðrar hoyringar hava verið viðv. somu byggiverkætlanini, er viðheft yvirlit yvir hesar hoyringar, eins og viðkomandi umsóknartilfar frá P/F Varðanum Pelagic.*

*Møguligar viðmerkingar skulu verða Tvøroyrar kommunu í hendi seinast mánadagin 22. apríl 2024 kl. 15:00, og skulu hesar sendast til: Tvøroyrar kommuna, Tvørávegur 37, 800 Tvøroyri. Eisini ber til at senda viðmerkingar til teldupost: tvoroyri@tvoroyri.fo*

**Viðmerkingar/orsøk til parts- og grannahoyring:**

Tá kommunan *sum byggimyndugleiki* viðger eina umsókn um loyvi til bygging, eigur kommunan, áðrenn hon tekur støðu til umsóknina, at kanna hvør er granni í mun til byggingina, og um nakar granni kann roknast sum partur í málinum.

Hetta skal gerast, so kommunan kann taka støðu til, um neyðugt er at fremja hoyring av grannum ella pørtum í málinum, og fyri at hoyringin verður framd á rættan hátt og eftir røttu reglum. *T.v.s. eftir ásetingunum í almennu byggisamtyktini hjá Tvøroyrar kommunu, bygningskunngerðini og ella eftir fyrisitingarlógini.*

Um grannin bert er at rokna sum granni, ella hvørt grannin evt. eisini er partur í málinum, er avgerandi fyri, hvat viðkomandi kann kunnast og hoyrast um, og í hvønn mun viðkomandi hevur rætt til innlit í byggimálið, og hvørji onnur rættindi viðkomandi hevur t.d. til at fáa grundgeving og rættin til at kæra.

**Hoyringsskriv:**

Send vóru íalt 54 hoyringarskriv og innkomin eru 5 svar. Eitt av innkomnu hoyringarsvarum er frá donskum adv. sum m.a. hevur fráboða ynskið um longda freist at svara: *"det skal indledningsvist nævnes, at dette høringssvar er foreløbigt. Der er anmodet om dansk over-sættelse af relevant færøsk lovgivning hos den færøske Rigsombudsmand, hvilket Rigsombudsman-den, ikke har kunnet nå at imødekomme inden fristen for dette høringssvar. Der tages derfor ud-trykkeligt forbehold for at komme med flere bemærkninger når vi har haft lejlighed til at sætte os ind i de relevante færøske lovbestemmelser.* ***Vi anmoder Kommunen om at afvente med at træffe afgørelse i sagen, til vi har haft mulighed for nærmere at gennemgå sagens materiale og relevant færøsk lovgivning samt indgivet supplerende bemærkninger til sagen.***

**Viðmerking kommunustjórin: Vegleiðing til freistir og ummælir:**

Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið ella viðmerkingar frá partinum skulu gevast myndugleikanum. **Freistin eigur at vera sett soleiðis, at parturin fær eina rímiliga tíð til at seta seg inn í upplýsingarnar og hugsa um, hvat er at gera. Biður parturin um longda freist, eigur umbønin so vítt gjørligt at verða eftirlíkað.** Tað kunnu tó vera umstøður, har tað ikki ber til at leingja freistina. Í slíkum føri eigur myndugleikin at kunna partin um, at um viðmerkingar hansara ikki eru móttiknir innan ávísa freist, tekur myndugleikin avgerð, tá freistin er farin.

**Lógargrundarlag:** Fyristitingarlógin og bygningslógin

**Til støðutakan hjá Tvøroyrar býráð er:**
At leingja freistina at svara uppá partshoyringarskrivið, og tilmælið um, at innkomin parts- og grannahoyringarskriv verða tikin við og viðgjørd saman við byggimálsviðgerðin av umsóknini frá P/F Varðin Pelagic um loyvið til at byggja lýsi- og protein verksmiðju á Tvøroyri.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum, um at leingja um svar freistina uppá parts- og grannahoyring frá verandi 22. apríl, til ístaðin týsdagin 7. maj 2024. - **Einmælt samtykt.**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at samtykkja, at innkomin parts- og grannahoyringarskriv verða tikin við og viðgjørd saman við byggimálsviðgerðin av umsóknini frá P/F Varðin Pelagic um loyvið til at byggja lýsi- og protein verksmiðju á Tvøroyri. **-Einmælt samtykt.**

**27/24**
**24/00075-2 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2024/25**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.03.2024 | 15/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 22.04.2024 | 19/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 31/24 |
| 4 Býráðið | 06.05.2024 | 27/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 05.03.2024**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá Føroya Eftirskúla til virksemið skúlaárið 2024/25.

Skúlastjórin skrivar í umsókníni at:

*Eg vil við hesari umsókn spyrja Tvøroyrar Kommunu um stuðul fyri skúlaárið hjá Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2024.*

*Tvøroyrar Býráð hevur verið virkin stuðul av Føroya Eftirskúla síðan skúlabyrjan 2020 og hevur árliga latið 400.000 kr í stuðli!*

*Stuðulin var býttur í tvær serstakar játtanir:*

- *Stuðul verður latin til gjald av hølisleigu, ljós og hita til undirvísingarhølir á Sjógøtu 2: kr. 200.000,-*
- *Stuðul verður latin til nýskapandi virksemið og rakstur skúlans: kr. 200.000,-*

*Eg vil við tí við hesari umsókn spyrja Tvøroyrar kommunu um somu upphædd fyri skúlaárið 2024.*

*Virksemi hjá Føroya Eftirskúla er rikið við stuðli frá Uttanríkis og Mentamálaráðnum og nemingagjaldið. Hartil kemur stuðulin frá Tvøroyar kommunu sum ger tað møguligt at reka tílíkt skúlatilboð sum er nýbrot í føroyskari skúlasøgu.*
*Í løtuni eru 2 full størv knýtt at skúlanum, eitt 3/4 starv og 5 tímasett størv og er hetta fongur fyri okkara bý og oyggj! Tilsamans áleið 4 ársverk!*

*Eru spurningar vil eg fegin svara teimum!*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar.

*Kapittul 6, Fígging av rakstri og íløgum*

*§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. írestandi fígging skal útvegast við nemingagjaldi og/ella privatum stuðli.*

*Stk. 2. Landskassans partur er:*

*1. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latín í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*

*2. Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett á FÆ2024, 418, Eftirskúlin í alt kr. 400.000,-, har av leigugjald fyri Sjógøtu 2, kr. 153.562,-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 11. marts 2024:**
Við tað at ongin roknskapur er innlatin, verður málið útsett til annan fund.

**Mentanarnevndin 22. april 2024:**
Einmælt samtykt at játta kr. 400.000,- í stuðul, har av kr. 200.000,- er til leigugjald -Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini. -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini og játta Føroya Eftirskúla stuðul á kr. 400.000,- í stuðul, har av kr. 200.000,- er til leigugjald. **-Einmælt samtykt.**

**28/24**
**21/00588-41 Nýgerð av spæliplássi í Froðba**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 15.09.2022 | 25/22 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 17.10.2022 | 11/22 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 19.04.2023 | 14/23 |
| 4 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.10.2023 | 31/23 |
| 5 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 17.01.2024 | 6/24 |
| 6 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 08.02.2024 | 13/24 |
| 7 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 11.03.2024 | 20/24 |
| 8 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 17.04.2024 | 24/24 |
| 9 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 32/24 |
| 10 Býráðið | 06.05.2024 | 28/24 |

**Málslýsing:**
Útgrevstur er byrjaður.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Útgrevsturin er ikki við í tilboðnum frá Arta.
Verður mett at kosta uml. 100.000 kr

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. september 2022:**
Nevndin er kunnað um at útgrevstur er byrjaður í Froðba.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin er kunnað um at graviarbeiðið er liðugt, og at vit hava fingið rokning áljóðandi 158.000 kr. v/MVG

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 19. april 2023:**
Nevndin er kunnað um, at spæliplássið er samlað á Hjalla, og klárt at senda til økið, men Arta er eitt sindur afturúr í tíðarætlanini vegna verður.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. oktober 2023:**
Nevndin er kunnað um, at arbeiðið er í gongd.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. januar 2024:**
Tekniska deild innheintar prís uppá fallundirlag í Froðba, so at eykajáttan at samtykkjast.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 08. februar 2024:**
Nevndin er kunnað um avtala er gjørd við lokalan veitara um at arbeiða víðari við málinum.
Arbeiðið krevur, at tað uml. 10 hitastig.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 11. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunna, nevndin ynskir eisini tilboð uppá fallundirlag av gummi granulat til alt økið.
Málið verður tikið upp á einum seinni fundi.

**Tekniska 16-04-2024**
Mælt verður til at taka av tilboð uppá fallundirlag frá áljóðandi 211.592,30 u/MVG.
Harafturat skulu keypast betongflisar, og arbeiðið skal útinnast.
Í FÆ24 er eingin játtan til endamálið.
Mett verður, at tað er neyðugt at fáa eina eykajáttan uppá 450.000 kr

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. april 2024:**
Samtykt at mæla til at fáa eina eykajáttan uppá 450.000 kr, og at seta gongd í arbeiðið skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini, og at fíggjingin verður veitt av játtan §619. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin og fíggjarnevndini at veita eykajáttan á kr. 450.000,- av §619 til liðuggerð av spæliplássinum í Froðba.

**29/24**
**23/00096-4 Sparkivøllurin í Trongisvági - umvæling**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 33/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 29/24 |

**Málslýsing:**
Gamla graslíkisvøllurin í sparkivøllinum í Trongisvági er tikin burtur orsakað av dálking.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
uml. 200.000 kr

**Tilmælið:**
Mælt verður til at útvega eykajáttan til at leggja graslíki á vøllin – ein meting frá sigur 170.000 kr.
Sostatt er tað ynskiligt at fáa ein fíggjarkarm áljóðandi 200.000 kr.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, og tekur fíggjarnevndin undir við ætlanini. Málið verður beint í mentanarnevndini.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at málið verður beint í mentanarnevndina. -**Einmælt samtykt.**

**30/24**
**23/00352-2 Thorshavn M/S -umsókn um stuðuls 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.11.2023 | 85/23 |
| 2 Mentanarnevndin | 22.04.2024 | 27/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 28/24 |
| 4 Býráðið | 06.05.2024 | 30/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.11.2023**
Umsitingin hevur hin 23.10.2023 móttikið umsókn um stuðul frá M/S Thorshavn.

Umsøkjarin skrivvar:

> *Vegna m/s Thorshavn sendi eg umsókn um fíggjarligan stuðul til Thorshavn til eina sera neyðuga verkætlan, sum vit tíverri ikki megna at lyfta einsamallir. Talan er um eina verkætlan til á leið 150.000 kr., har okkara eginfígging kemur at liggja um 60.000 kr. Tað er hesa upphædd, vit søkja um stuðul til.*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023, §522, 10. Stuðul til mentan

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 20. november 2023:**
Einmælt samtykt at bjóða umboð fyri felagið Thorshavn til kunnandi fund við mentnarnevndina.

**Mentanarnevndin 22. april 2024:**
Einmælt samtykt at lata kr. 60.000,- í stuðul samb. umsókn frá stuðulsfelagsskapinum Thorshavn dagf. 23. okt. 2023. Heitt verður á Thorshavn um at luttaka aktivt, tá tiltøk verða fyriskipa í kommununi.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og at stuðulin verður veittur av játtanini FÆ2024, §522, 10. Stuðul til mentan.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini at veita stuðul til Thorshavn á kr. 60.000,-, og at hetta verður fíggja samb. tilmælið hjá fíggjarnevndini. -**Einmælt samtykt.**

**Til kunningar**

## 11/24
## 24/00089-2 RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2024 | 95.1/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 11/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19.03.2024**
Við hesum verður boðað limunum í Ráðnum fyri Ferðslutrygd frá, at ársfundur verður fríggjadagin hin 5. apríl 2024 í Løkshøll frá kl. 10.00 til kl 14.00.

Heitt verður á limirnar at boða frá, hvør møtir teirra vegna á ársfundinum í seinasta lagi týsdagin 25. mars kl. 12.00

**Lógargrundarlag:**
- Formaðurin kallar inn við 30 daga freist (§5)
- Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu verða formanninum skrivliga í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri ársfundin og verða send limunum 7 dagar fyri fundin. (§6)
- Til ársfundin sendir hvør limur eitt umboð, sum hevur heimild at taka støðu vegna limin. (§4)

Nevndarval er annað hvørt ár og í 2024 standa tveir nevndarlimir fyri vali. Eisini skulu veljast tveir varalimir. Starvsnevndasrlimir kunnu verða afturvaldir.

Hesi mynda nevndina í RFF í dag:
- Jónhild Rasmussen, forkvinna (Betri trygging)
- Mikkel H. Frandsen, næstformaður (Ráð) - stendur fyri vali
- Vivian Johansen (Trygd) – stendur fyri vali
- Marjun Jógvansdóttir (Tórshavnar kommuna)
- Karl Leonsson (Føroya politi)
- Bergur Samuelsen, varalimur (Føroya lærarafelag) – stendur fyri vali
- Brandur Fríðmundsson, varalimur (Akstovan) – stendur fyri vali

Umframt skrá sambært viðtøkunum fara vit, sum vant, at hava okkurt fakligt upplegg. Hesaferð fara vit millum annað at frætta frá heilt feskari hugburðskanning millum føroyingar um ferðslu

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Kristin Michelsen mælir til, at Alvi Mortensen møtir á fundinum umboðandi Tvøroyrar kommunu.
Einmælt samtykt.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**12/24**
**24/00131-5 SEV -aðalfundurin 19. apríl 2024.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 06.05.2024 | 12/24 |

**Málslýsing: Komunustjórin 24.04.2024**
SEV hevur innkalla allar lima kommunur til aðalfund 19. Apríl 2024.

SEV skriva í innkallingini:

*Góðu eigarar, nevnd og leiðsla Sev's*

*Viðheft er:*

- *Fundarboð til aðalfundin fríggjadagin, 19. apríl 2024, kl. 10:00, á Hotel Føroyum*
- *Frágreiðing frá nevndini, apríl 2024*
- *Roknskapir fyri samtak, net- og framleiðslu umframt fyri dótturfeløgini P/F Vindfelagið í Neshaga og Porkeri og P/F Vindfelagið í Húsahaga*
- *Yvirlit yvir atkvøðutal uppgjørt við støði í fólkatalinum pr. 1. februar 2024*
- *Fulltrúarváttan*
- *Tilmeldingarlisti*

*Eins og til síðsta aðalfund verða fundarboðini og tilhoyrandi tilfar bert sent við telduposti uttan so, at limakommuna, í sambandi við niðanfyri nevndu váttan fyri móttøku, ger vart við, at hetta eisini skal sendast limakommununi við Posta.*

*Fulltrúarváttan og tilmeldingarlisti skal latast høvuðsskrivstovuni hjá Sev, att.: Fyrisitingartoymið, skjótast gjørligt og kann eisini sendast Sev við telduposti til SEV.*

**Kommunustjórin 24.04.2024**
Til kunningar er fundarfrágreiðing frá aðalfundinum hjá Sev 19. apríl 2024.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**13/24**
**24/00004-1 Skattatøl 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 8/24 |
| 6 Býráðið | 06.05.2024 | 13/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 19:25

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Jens Arni Hammerfoss Leo